gult cyan magenta svart

EG MEINI TAÐ

Tankar í kava

Bárður Olsen
semic@post.olivant.fo

Tað sigst, at alt gongur seinni, tá tað er kalt, tó ikki tankar og tíð. Tað er kalt. Á trøðunum hongur kavi. Náttúran er farin í sín ævintýrkenda og meditativa búna. Tað er vindstilli tað tykist, sum tíðin stendur í stað. Bilar standa og spola í brekkunum, men eg gangi kvikliga framvið. Móti einum heimleysum manni. Løgið hugsi eg, hetta er ikki Keypmannahavn ella ein annar stórbýur, men bara Tórshavn. Hann situr einsamallur, á einum bonki. Tað er synd í honum, men vit eru jú øll einsamøll.

Við verða fødd einsamøll og vit doyggja einsamøll. Hetta hava vit øll til felags. Einsamøll eru vit, tá vit eru tað, men eksistentielt einsemi er næstan alla tíðina. Hetta einsemi ger, at vit spyrja hvørji vit eru og hvat vit eru, hvar vit koma frá og hvar vit fara. Fyri at fylla hetta einsemi, hava vit átrúnað, politiskar og aðrar ideologiir, men tað einasta, ið kann fylla hetta tómrúm er kærleiki. Fyri at hugsa um tílíkt, er tað als ikki neyðugt, at verða filosofiskur, rithøvundur ella serskøltur, men tað er ein fyrimunur at vera tað.

Innaftur komin, kóki eg mær ein góðan kopp av kaffi. Tracy Chapman singur: Talkin bout a revolution. Hitin rennur út í hvørja træðr. Lagið er gott, men so hugsi eg aftur um tann heimleysa mannin. Hvar man hann verða nú? Hann situr onkrastaðni og bíðar, til herbergið hjá Frelsunarherinum letur upp. Ójavnt er býtt.

Eitt samfelag fyri øll, utopi ella dreymur? Hugsi, eg eitt sindur beiskur í huga. Veruleiki er tað, í hvussu er ikki. Var til eina samtalu fyri stuttum. Konan segði: Tú stamar. Síðani segði hon: Tú stamar illa. Eina lítla løtu hevði eg hug, at taka synd í mær sjálvum, kanska av gomlum vana. Eg gjørdist eitt sindur klókkur, hvat so um eg stami? Hevði eg hug at spyrja. Kanska skuldi eg sagt henni, at nakrir av tídningarmiklastu monnunum í heimssøguni eisini stamaðu? Isaac Newton, Charles Darwin og Winston Churchill, bara fyri at nevna nakrar.

Eg droymi meg aftur í tíðina. Minnist tá eg sum barn spældi úti í kavanum. Hvar er tíðin farin? Tað var gott, at verða barn. Hvat høvdu fólk sagt, um eg nú legði meg niður í kavan at gera einglar? Melankoli og gleði blandast saman. Um eg var ein fuglur, so hevði eg flogið avstað og komi aftur, tá tað fór at vára. Men eg eri ikki ein fuglur og tann eingilin, sum eg í tonkunum geri mær, dugir ikki at flúgva.

Tað er nátt, fullmáni og stjørnuklárt. Eftir himmalinum flutti okkurt seg. Fyrst helt eg, at tað var ein stjørna, men tær flyta seg ikki á henda hátt. Síðani mintist eg til altjóða rúmdarstøðina. Kanska sita fólk, har uppi og droyma seg niður á jørðina? Siti sum so ofta fyrr og skrivi. Havi góðan hug at steðga, men skundi mær at skriva tað síðsta. Tí í morgin er aftur ein dagur.

Zappa bannaður

ROKKUR
Birgir Kruse

Tríati ár eru í dag liðin síðani Frank Zappa og rokkbólkur hansara Mothers of Invention vórðu settir á dyr í Royal Albert Hall í London. Ætlanin var at hava stóra konsert á hesum gitna staði saman við The London Philharmonic Orchestra. Á skránni vóru brot úr verkinum »200 Motels«, har Frank Zappa hugleiðir um upplivingar hjá einum ferðandi orkestri »on the road«, sum tey siga. Onkrir av tekstunum í hesum verki vórðu mettir ónæirsligir og fingu frámerkið »obscene«, tá ein almenn bretsk dómsnevnd henda dag varð sett at lurta eftir plátuni »200 Motels«. Plátan var ljóðsporið úr samnevnda filminum, har umframt Zappa, eisini Ringo Starr og Keith Moon medvirkaðu. Hin balstýrni Keith Moon hevði leiklutin sum nunna. Londonfilharmonikararnir høvdu medvirkað í ljóðupptøkunum til henda filmin, sum eisini var sýndur í Sjónleikarhúsinum í Havn. Filharmonikararnir høvdu einki ilt at siga um hesa uppliving, sum tó bleiv tikin av skránni og bannað at framføra í Royal Albert Hall, í dag fyri nett tríati árum síðani. Eitt av mongu hæddarpunktum Frank Zappas, sum vit kunnu lesa um í áhugaverdari grein hjá Høgna Djurhuus inni í blaðnum.

Chunga's Revenge, plátan við tónleiki frá filminum »200 Motels«, sum sýndur varð í Sjónleikarhúsinum í Havn

Jazzsøgan – sum tygum ynskja

JAZZUR
Birgir Kruse

Fyri jól kom enn ein søga um jazzin á marknaðin. Bæði bók, fløgur og videofilmar. Tað eru plátufelagið Columbia, sum saman við kenda jazzmerkinum Verve, hava heitt á Ken Burns at seta eina jazzsøgu saman. Heitið er »Ken Burns Jazz: The Story of America's Music«. Útgávuróðin fevnir um 22 fløgur, sum hvør í sínum lagi lýsa størstu søguligu jazznøvnini. Hesar fløgur fáast allar stakar. Hevur ein hug at fáa jazzsøguna samansjóðaða, so hon eisini passar snøgt í hillina, so fæst ein úrdráttur, ið fevnur um fimm fløgur í eini snøggari boks. Vil ein hava jazzsøguna á bert einari fløgu, ja so ber eisini tað til. So nú fæst jazzsøgan í tí vavi, júst sum tygum ynskja.

Millum nøvnini á »The Story of America's Music« eru Louis Armstrong, Dave Brubeck, Miles Davis, Sidney Bechet, Ornette Coleman, Duke Ellington, Benny Goodman, Fletcher Henderson, Thelonious Monk, Herbie Hancock, Charles Mingus, Count Basie, Art Blakely, Jon Coltrane, Ella Fitzgerald, Dizzy Gillespie, Coleman Hawkins, Billie Holliday, Charlie Parker, Sonny Rollins, Sarah Vaughan og Lester Young.

Bókin, sum fylgir fløgunum og ber sama heiti, verður givin út á bókaforlagnum Knopf. Sjónvarpsfilmarnir, sum eru 18 í tali, verða undir heitinum »JAZZ« vístir í amerikanskum sjónvarpi beint nú.

Amerikumaðurin Ken Burns (f.1953) hevur gjørt dokumentarfilm í tjúgu ár. Í 1981 gjørdi hann »Brooklyn Bridge« sum hetta árið kappaðist um Oscar-virðislønina, men fekk hana ikki. Síðani hevur hann gjørt søguligu filmarnar »Civil War« (1990) og »Baseball« (1994). Søgufrøðingurin Stephen Ambrose hevur sagt um filmarnar hjá Ken Burns, at »fleiri amerikanarar fáa søguundirvísing frá Ken Burns enn nakra aðrastaðni frá«. Tað kann so siga okkum nakað um bæði ivasama søguundirvísing og tølandi fjølmiðlatilboð í Amerika.

Heimasíða: www.legacyrecordings.com/kenburnsjazz/flash.html

Klokkan støðgaði

MEIRA ROKKUR
Birgir Kruse

Í gjár vóru tjúgu ár síðani rokk-klokkan yvir øllum støðgaði, tagdi og fór úr tíðini. Hin 9. februar 1981 slóknaði Bill Haley, sum í fimtiárunum skapti hugtakið rock and roll á plátu við sanginum »Rock around the Clock«. Tað var hin 12. apríl 1954, at William John Clifton Haley, sum fulla navn hansara var, spældi inn henda sang sum b-síðu á plátuni »Thirteen Women«. Upptøkan fór fram í New York og vakti lítlan áhuga. Haley hevði frammanundan roynt seg sum kovboy, men alt til fánýtis. Árið eftir, í 1955 er sangurin um klokkuna við í filminum »The Blackboard Jungle«. Glenn Ford hevur høvuðsleiklutin og sangurin verður bráddliga spældur víðahvar. Á henda hátt gjørdist Bill Haley fyrsti hvíti sangari, ið kom á almennu topplistarnar við einum rokksangi. Samstundis setti hann ferð á eitt nýtt fyribrigdi, har elektronikkur gekk hond í hond við uppreistrarsinnaðan ungdóm, sum legði líka í skilnaðin millum svørt og hvít. Og so kom Elvis. So tá John Lennon sigur, at »before Elvis there was nothing« er tað ein sannleiki við modifikatiónum. Ikki kann sigast, at Bill Haley, sum hóast alt gjørdist ein av lykilpersónunum í rokksøguni, kom til skorin klæði. Sjálvt útsjóndina hevði hann í móti sær í føgru nýggju ungdómsfikseraðu undirhaldsverðini. Farin um tey tredivu, heldur hilligur og so hárið og lokkurin, sum sloktur lá niður á ennið. Hetta kendist ikki eggjandi hjá ungdómi, sum var farin at klæða seg í leður. Og ikki minst keypa plátur. Ei undur í, at hin yngri og meiri tíðarrætti Elvis, skjótt trokaði hann av rókini. Haley og spælimenn hansara The Comets vóru tó nógv frammi millum 1955 og 57. Ikki færri enn 21 av plátum teirra komu á tiltikna Billboard listan, teirra millum »Burn that candle«, »See you later alligator«, »The Saint's rock and roll«, »Rockin' thru the rye«, »Rip it up« og »Rudy's rock«. Mett verður, at Bill Haley seldi fleiri enn 60 milliónir plátur meðan hann livdi. 56 ára gamal sovnaði Bill Haley stillisliga inn í deyðan, heima í Harlington, Texas. Rokkstjørnum líkt, hevði hann drukkið illani, nú klokkuverkið støðgaði og ikki orkaði meir. Haley, ið legði støði undir mest kollveltandi frambrotið í vesturheiminum í farnu øld, var farin úr tíðini.

Bill Haley 6.7.1925-9.2.1981

Vikuskifti
Postboks 19, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

ÚR FÁMARÁ TIL MAINZ. Í eitt tveyára skeið verður Rúni Brattaberg bass-solistur í Týsklandi, har trý operahús sóknast eftir solisti. Tá Rúni lá framvið, vildu tey øll hava »óslípaða diamantin« úr Føroyum. Í august kemur hann til Føroya og næsta ár fara hann og Jóhannes Andreassen at arbeiða við løgum hjá Regini Dahl í útsetingum hjá Sunleifi Rasmussen

Úr øðrvísi heimi

Rúni Brattaberg hevur fingið tvey ára sáttmála sum bassolistur á operahúsinum í Mainz í Týsklandi
Mynd: Jens Kr. Vang

OPERA
Birgir Kruse

»Hetta er maður úr øðrvísi heimi« tekur Gunnar Hoydal til, tá hann lýsir røddina hjá Rúna Brattaberg. »Henda røddin, full av náttúru, sum eingin skúling í heimsins meginlondum fær kámað burtur« sigur hann í teksti á fløguni »Brotið«, sum Tutl gav út í heyst.

Í ummæli sigur Oddvør Johansen um somu fløgu, at Rúni er »sum ein óslípaður diamantur, ráur og fullur av møguleikum«. Orðini, sum Oddvør nýtir, sipa samstundis til ummælið hjá Mats Liljeroos í finlandssvenska »Huvudstadsbladet«. So tað eru ikki bara vit í Føroyum, sum hava fingið eygu og oyru upp fyri »syngjandi bóndasoninum úr Famará«, sum Oddvør tekur til.

Nú grør um gangadi fót og Rúni er ávegis til Týsklands. Eftir at hava verið til sonevndar »auditions« ymsa staðni í Evropa hetta seinasta árið, varnaðist Rúni tríggjar lýsingar, har operahús í Týsklandi sóktu eftir bass-solisti. Hann sókti og fekk øll trý størvini. Besta boðið helt hann verða frá Staatsteater Mainz við Frankfurt. Har verður so starvsstaður Rúna frá august og tvey ár fram.

Í meylsamrøðu við Sosialin sigur Rúni, at klassiski heimurin er einki annarleiðis enn popp- og rokkheimurin, tá umrøður at koma fram og fáa frægastu tilboðini. »Hetta er nóg gott strev« sigur hann, »Akkurát sum í trashverðini; alt ov nógvir sangarar til tey fáu og oftani illa løntu størvini, sum leys eru. Men ein má og skal hava vónina um »the big time«. Og tá er tað týdningarmesta, at tey røttu fólkini, sum hava ávirkan, hoyra teg!«

Rúni hevur fyrst verið til sonevndar »auditions« hjá eini fimtan sjónleikaraagentum, so møguleiki kundi verða at koma inn á okkurt operahús at syngja. Hetta hevur nú eydnast og ein agentur í Frankfurt tekur sær av arbeiðnum fyri Rúna. Hann tekur móti tilboðum frá operahúsum og metir um tey og hvør av mongu sangarunum, hann umboðar, skal hava tey.

Rúni hevur leingi dvølst í Finnlandi. Spurdur um, hví Finnland bleiv so áhugavert at royna seg í, sigur hann, at svarið er ógvuliga einfalt. »Eg arbeiddi frá 1995-97 í Danmarks Radios Konsertkor í Keypmannahavn. Ein dagin var eg saman við pianistium Per Salo. Hann er finni og lat meg hoyra eina fløgu við gubba sínum, Jorma Hynninen. Hesin Hynninen var í 80'unum og 90'unum millum heimsins bestu barytonsangarar. Tá gjørdi eg upp við meg sjálvan, at honum vildi eg syngja hjá. Skrivaði honum bræv og spurdi um møguleiki var at fáa nakrar sangtímar. Jú, tað var gamaní. Eg var so í Savonlinna í juni 1996 og arbeiddi við Jorma Hynninen í tíggju dagar hetta summarið. Vit avráddu, at eg skuldi søkja um upptøku á Sibeliusakademinum í Helsingfors várið eftir. Eg slapp inn og var har til 1999, tá eg fór til Internationales Opernstudio í Zurich í Sveits.«

»Men Finnland er landið, sum hevur størstan týdning fyri meg«, sigur Rúni Brattaberg. »Fyrsti klassiski bass-sangari eg hoyrdi var finski Martti Talvela. Hesin fantastiski sangari doyði tíanverri í 1989, so tað var á fløgu, hann vissaði meg um, at Finnland var landið eg skuldi fara til.«

Næsti lærari hjá Rúna var enn ein finni, Kim Borg. »Vit høvdu eitt sera ríkt samarbeiði frá 1996 til í fjør tá hann doyði«, sigur Rúni. Fløguútgávan við heitinum“Brotið”er ognað minninum um Kim Borg.

Triði lærarin hjá Rúna er eisini finni, Tom Krause á navni. Teir hava longu samstarvað í nøkur ár og um hetta samstarv sigur Rúni, at tað er sera spennandi. Men hjá føroyska ferðamanninum, er Finnland ikki minni spennandi, sigur Rúni. »Her eru øgiligar víddir, rólig fólk, sauna og nógv koskenkorva«, leggur Rúni skemtandi afturat.

– Tann veruleiki, at tú byrjaði so seint at syngja, hevur tað á nakran hátt komið tær til góða, ella øvugt?

»Fyri meg hevur tað bara verið gott, at vera seinur á veg«, sigur Rúni. »Teir leiklutir, sum eg syngi, eru ofta prestar, kongar, devlar og annað ónt, sum krevur at ein helst ikki er verri fyri, at vera í eldra lagi.«

– Hvat var tað, sum fekk teg at sleppa myndatólinum og syngja í staðin?

»Tað var ikki fyrr enn eg var undir útbúgving á fotografskúla í Keypmannahavn, at eg komdi mær at fara í eitt áhugakór. Men har skuldi eg til upptøkuroynd og so skal ein syngja solo og tað hevði eg ikki roynt. So eg mátti fáa ein sanglærara og so gekk tað eisini skjótt.«

– Tú ert við á skránni, tá vit fyrstu ferð uppliva eina Listafólkastevnu í august ár. Hvat bjóðar tú føroysku áhoyrarunum?

»Eg fari saman við Ólavi Kjartan, barytonsangara, at framføra »Gluntarna« hjá Gustavi Wennerberg hin 8. august í Norðurlandahúsinum. Ólavur Kjartan sang leiklutin sum Makedonarin í juni í fjør, tá »Jesus og Makedonarin« hjá Paula í Sandagerði og Sigmundi Poulsen varð framførdur. Eg gleði meg nógv til hetta kvøldið. »Gluntarna« eru vælumtóktir millum føroyingar, so vit fáa helst eitt fínt kvøld!«

– Í heyst gav Tutl út fløguna »Brotið«, har tú syngur. Hvussu hevur fløgan verið móttikin?

»Fløgan hevur fingið góða móttøku í Føroyum og eisini í øðrum londum. Eg havi brúk fyri einum visittkorti og eg haldi, at hon gongur ann. Tað er ein stór verkætlan, at spæla tílíkt inn á band, ella festa tað á digitalan teknikk. So eg haldi meg hava lært nógv av hesum eisini.«

– Er nakað nýtt ávegis?

»Ja, eg arbeiði saman við Jóhannes Andreassen, pianisti við eini nýggjari og ógvuliga spennandi verkætlan. Vit ætla at spæla eina fløgu inn á heysti 2002 við løgum hjá Regini Dahl við arrangementum hjá Sunleifi Rasmussen. Løgini hjá Regini – ikki minst við røttu arrangementunum – eru veruliga á einum slíkum støði, at tey kunnu framførast við síðuna av Sibelius og Schubert í konsertsalum úti í heimi!«

Rúni, sum vit hittu um meylin í Sveits, hevur samband við føroyingar, sum eisini búgva har í landinum. Annars er tað bara telefonin og meylurin, ið er sambandið, sigur Rúni.

»Men ongastaðni trívist eg betur enn í Føroyum um summarið«, sigur hann. »At ganga í fjøllunum, at siggja og kenna náttúruna og fara á flot. Tað dámar mer væl. Men at verða fastbúgvandi í Føroyum«, sigur Rúni, »tað vænti eg ikki fer at bera til. Ikki tey komandi árini, um alt gongur so nøkurlunda.«

Rúni Brattaberg í Norðurlandahúsinum í fjør, tá »Jesus og Makedonarin« varð framførdur. Í august kemur hann aftur.
Mynd: Jens Kr. Vang